

Karin Kjølbro



# Er tað verri at ræna ein banka enn at stovna ein banka?

Yvirskrivtin kundi verið ein viðmerking til altjóða fíggjarkreppuna. Orðini eru úr Brecht Cabarettini – GOYM MORALIN TIL SEINNI, ið verður framførd á Tjóðpallinum í hesum døgum.

Tað er nýstovnaði leikbólkurin GRUGG, ið bjóðar vælkomin. Í somu løtu dyrnar lata upp til leikhøllina, er tú greið yvir, at her hendir nakað, ið ikki plagar at henda. Gjørdist nærum ovfarin. Allir sjónleikarar koma tær fryntliga ímóti og bjóða vælkomin. Sama gólvið, tú stígur inn á, er pallur og áskoðararnir sita uppeftir á báðumegin – nærum í atriumsgarði.

Hvussu skal tað byrja, tá allir leikarar longu eru á pallinum og ljós er inni? hugsaði eg, tá onki leiktjald er? Væntaði, at tey fóru útaftur fyri síðani at koma innaftur og byrja framførsluna. Jú lætt og elegant er svarið: Ljósið verður sløkt,- tað er myrkt nøkur sekund, og tá ljósið aftur verður tendrað, er leikurin byrjaður við miklum ágrýtni, sangi, tónleiki, virkisfýsni – og stundum jongleringum og akrobatikki. Samanumtikið jaligt energi. Eisini er hetta ogn í víðkanini av býarlívinum í Havn. Í vikuskiftinum byrjar framførslan kl. 10 á kvøldi, so smábarnaforeldrini kunnu leggja børnini, áðrenn barnagentan tekur við, soleiðis at tað legst ein serligur upplivingardámur yvir kvøldið

Tær hava verið stórtøknar íbirtarakonurnar – Barbara Christoffersen, Ria Torgarð og Súsanna Torgarð – at leggja lunnar undir leikbólkin Grugg við Bertolt Brecht, at fáa royndu sjónleikararnar Hans Torgarð og Páll Danielsen at vera við og síðani Sonju Kelhler sum leikstjóra við sínum finska spælimanni. Hon er víðagitin sum mætasti Brechttulkari. Víst eru hesir sjónleikararnir nøkur av okkara allarbestu undir øllum umstøðum, Men onkursvegna gevur leikstjórin teimum eykaorku ella megi. Tey eru ikki kørg við at brúka seg sjálvan, sín kropp og sína rødd. Tað tykist at fella teimum ómakaleyst og leikandi lætt. Og so er veruleikin, at hetta eru millum kravmiklastu leiklutir á palli yvirhøvur.

Tekstirnir eru tiknir úr ymiskum leikum og tekstum hjá Bertolt Brecht, sum ofta brúkar ein sang uppií fyri at framskera boðskapin. Yvirskrivtin til hesa grein er tó tikin úr einum teksti, ið Hans so meistarliga ber fram, soleiðis skiftir Brecht ímillum ymisk amboð, so eingin skal vera í iva.

Barbara Christoffersen hevur fá ár á baki í mun til hini, men hon smæðist ikki burtur millum tey, ið frammanundan eru vorðin fólkaogn. Ikki bert hon, men eisini hini eru í góðum selskapi. Tað vísti hon eisini sum trúboðarastjúkmamman við hinkubeini í ***Aftaná undrið*** .

Har var annars nógv at lata seg hugtaka av. Mær dámdi serliga væl varliga og eyma ástarleikin við Hans og Riu eins og dansin hjá Pálli og Riu. Hetta var alt so javnt gott, at ilt er at taka dagar ímillum, men jongleringin hjá Hansi og Pálli við stavinum, har teir bæði fingu mentalar og likamligar veingir, har stavurin samstundis var álitið, lyfti eisini okkum askoðar uppfrá í kæti.

Bertold Brecht er ikki nakar hvørsumhelst. Doyði 58 ára gamal fyri meiri enn hálvari øld síðani og er kortini alsamt áhugaverdur og hugvekjandi. Listarliga nýhugsan hansara lá í at beina fyri romantikki og kenslum, ið laga seg eftir hinum einstaka. Sjónleikur skuldi ístaðin fyri undirhald eggja til skynsemi og skil og síðani fáa fólk at hugsa og taka støðu ístaðin fyri at lata seg tøla ella lata seg taka av fótum. Han hugsaði altíð politiskt – sosialistur um ein háls, og niðurstøðan var, at:

*Um tey niðastu ikki hugsa um tey niðastu, so fáa tey ongatíð høvdið fyri seg.*

Teksturin er ofta stuttligur og beinrakin, tí vit kenna okkum sjálvi og onnur aftur í boðskapinum.

Pallurin er so nakin hann kann verða, nakrir sodavatnskassar, ein skotskur stavur við drykkisteypi i handtakinum og ein fótboltur. Búnarnir minimalistiskir. Á henda hátt verður boðskapur Brechts eisini mest sjónligur. Einki fjas við kenslum og friðsælu. Einki uttanumtos.

Sjónleikararnir vóru á alla tíðina. Tú sást tey ikki bert framman og aftan, men eisini úr erva, og tey fylti pallin og rúmið saman við empatiska klaverspælaranum Hans Paula Torgarð. Tøkk og prís, at tey ikki kunnu lata vera við at gera sjónleik. Tað man vera tað, ið drívur verkið.

Samanumtikið satiriskur og stuttligur sjónleikur um peningaligt mutur og grammleika, svik og fals. Viðurskifti, ið eru vorðin so sjónlig undir núverandi globalu búskaparligu kreppuni. Ivist ikki í, at onkur eisini spyr: Júmen er tað ikki júst hetta, ið eisini fer fram í landi okkara, har politiska og peningaliga valdið skiftast um at leikstjørna og framføra og goyma moralin til seinni, meðan

*tey niðastu ikki fáa høvdið fyri seg.*

Hjá okkum fært tú eina lønandi útbúgving

FØROYABANKI

Føroya Banki søkir í løtuni eftir næmingum.

Í Føroya Banka eru vit dugnalig, eldhugað og framsøkin. Tí hava vit ment okkum til eitt sterkt norðurlendskt samtak við 450 starvsfólkum í Føroyum, Íslandi, Danmark og Grønlandi.

Vilt tú verða partur av framtíðini hjá Føroya Banka? Vilt tú verða ein av okkum?

Send tína umsókn við CV og møguligum prógvum við telduposti til starvsfolk@foroya.fo.

Umsóknarfreistin er 19. juli.



Les meira á www.foroya.fo

SENDISTOVAN